út at koyra

Honda samstarvar vi› Rover

Honda hevur lova› n‡ggja eigaranum av Rover fyritøkuni í Onglandi, Phoenix Partners, at teir vilja levera platformar til komandi Rover bilmodell.

Kelda: Motor Magasinet

Jaguar og Ford

Ford eigur Jaguar bilaverksmi›juna, sum samstarvar vi› Aston Martin og Lincoln um platformar og komponentar.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Væl útgjørdir italienarar

Øll komandi bilmodell frá Fiat-konsernini fáa t.d. navigatiónsskipan, teldur, e-mail og aut. samband vi› ein alarmsentral, um okkurt skuldi veri› áfatt. Nógv av hesum er longu at finna í Alfa 147.

Kelda: Motor Magasinet

Ta› er smart at koyra Smart

Smart er bert 2,50 m langur, og harvi› lættur at parkera

MAGNUS GUNNARSSON

Eftir eina sera trupla byrjan, er gongd komin á bilaframlei›sluna hjá Smart fyritøkuni í Alsace, og í fleiri stórb‡um er ta› vor›i› móti at koyra Smart.

Smart og Swatch

Smart verkætlanin kom upprunaliga frá designarasentrinum hjá Mercedes-Benz í USA, men ta› vísti seg at Nicolas Hayek, stjóri á Swatch urverksmi›juni í Sveits, hev›i næstan sama hugskot. Hetta førdi til samarbei›i millum Mercedes og Swatch um hendan lítla og orkusparandi b‡bilin.

Til tvey fer›andi

Smart er ein lítil bilur til tveir persónar, i› er 2,50 m langur, 1,45 m brei›ur og 1,55 høgur. Ta› kemur fyri, at bilar, sum eru høgir og smalir, hava trupulleikar vi› stabilitetinum. Teir fyrstu Smart sum komu á markna›in, høvdu lyndi til at lætta sær á og koppa í svingum, tá teir vór›u testa›ir. Fleiri altjó›a bilaútleigarar, i› høvdu gjørt sáttmálar um at keypa Smart bilar, søgdu sáttmálarnar upp, tá teir frættu at teir ikki vóru nóg tryggir. Úrsliti› av hesum var›, at Nicolas Hayek, tók seg úr samarbei›inum, og DaimlerChrysler yvirtók fyritøkuna, sum nú eitur MCC Gmbh, i› er ein stytting av Micro Compact Car.

30 km pr. litur

Motorurin liggur omaná bakaksulinum, og bilurin er bakhjólstrektur. Smart fæst vi› tveimum ymiskum 600 cc bensinmotorum vi› innsprænging og turbo, annar hevur 45 hk, og hin 54 hk. Eisini fæst hann vi› tí n‡ggja 800 cc CDI turbodiesel motorinum vi› 41 hk, sum koyrir uml. 30 km fyri hvønn litur av olju.

Konufólkabilur

Byrjunartrupulleikarnir eru nú loystir, og bilarnir eru væl móttiknir. Smart er gjørdur út frá kanningum, sum vísa, at ta› sum oftast eru tvey fólk í teimum smáu bilunum, sum koyra inni í b‡unum. Serliga konufólkini hava tiki› væl ímóti Smart, sum er nógv brúktur í stóru b‡unum í Europa, so sum Hamburg, Frankfurt, Berlin, Rom, Torino og Milano. Har ta› vegna plásstrot er sera hent at hava ein bil, sum bert er 2,50 m langur, og harvi› lættur at parkera.

Serliga konufólkini hava tiki› væl ímóti Smart

Eitt sereykenni fyri Smart, er at teir eru sera litríkir, bæ›i uttan og innan

út at koyra



Jeep Grand Cherokee. Í hesi n‡ggjastu útgávuni, sum veruliga sær út av nøkrum, bæ›i uttan og innan, eru linjurnar meira rundar enn frammanundan

Jeep Grand Cherokee Limited

Motorurin:	3.1 litur 5 syl. Turbodiesel 140 hk
Oljun‡tsla:	11,7 km/l
Dekkstødd:	245/70-16
Stødd og vekt	
Longd:	461,3 cm
Breidd:	183,9 cm
Hædd:	176,2 cm
Eginvekt:	1874 kg
Prísir:	frá kr. 311.000,- sum Van
Søluumbo›:	Ivan Johansen Bilar Hoyvíksvegur 63 Fo-110 Tórshavn Tel. 313666

Jeep Grand Cherokee ein ekta›ur amerikanari

MAGNUS GUNNARSSON

Í sambandi vi› at Mercedes-Benz og Chrysler hava lagt saman, hevur bilasølan hjá Ivan Johansen, fingi› umbo› fyri vælumtókta amerikanska bilmerki›, Jeep. Hetta eru einastu jeepar, sum hava einarætt at brúka navni› Jeep, i› kemur av General Purpose Car, stytt til GP, og úttalast á enskum, (dji:p). Jeepur hevur annars veri› brúkt sum felagsheiti fyri allar høgar bilar vi› f‡rahjólstrekki.

Willys Jeep

Upprunaliga vór›u Jeep framleiddir í byrjanini av seinna heimsbardaga av Willys-Overland í USA. Willys Jeep blivu heimskendir sum teir amerikansku herna›arjeeparnir, og vóru fyrimyndin hjá eitt nú Land Rover. Í 1956 komu teir undir Kaiser-Jeep, eitt sjálvstø›ugt bilmerki, og í 1970 var› Kaiser-Jeep verksmi›jan løgd saman vi› American Motors, sum gjørdi Rambler bilarnar. Seinni komu teir undir Chrysler, og nú hoyra teir til DaimlerChrysler.

Quadra Drive

Jeep Grand Cherokee er ein ekta›ur amerikanskur jeepur. Í hesi n‡ggjastu útgávuni, sum veruliga sær út av nøkrum, bæ›i uttan og innan, eru linjurnar meira rundar enn frammanundan. Grand Cherokee er tann fínasti í modellskránni hjá Jeep. Hann hevur eitt framkomi› Quadra Drive f‡rahjólstrekk sum t.d. b‡tir kraftina millum akslarnar aftan og framman, umframt at hann hevur reduktiónsgear, eins og kraftin ver›ur skift millum vinstra og høgra hjól, treyta› av, hvussu vegtaki› er.

Turbodiesel og le›ursetur

Man situr høgt vi› gó›um úts‡ni, í fínum le›ursetrum, og bilurin er lættur at yvirsko›a. Eisini rætti› er úr le›ri vi› kontaktum til radio og fartpilot.

Motorurin á bilinum, vit royndarkoyrdu, er ein 5 syl. 3.1 l turbodiesel vi› 140 hk. Hann fæst eisini vi› bensinmotorum, einum 6 syl. 4.0 litur vi› 190 hk. og einum 4.7 litur V8 motori vi› 223 hk. 4-trins automatgear er standard í øllum útgávunum.

Av útger› er m.a. airbags, sentrallás, klimaanlegg, elspegl vi› hita og setrini hava el-stillingar. Ein Grand Cherokee koyrir sum h‡ruvognur í Havn. Fja›raskipanin er so gó›, at hann kann væl brúkast sum h‡ruvognur, hóast hann er naka› hægri enn vanligir h‡ruvognar.